

# Granskarar

## - Alivísind og marin biotøkni

P/F Fiskaaling søkir tveir granskarar til at styrkja um granskingarvirksemi stovnsins.

P/F Fiskaaling er ogn hjá Føroya Landsstýri. Høvuðsskrivstovan er við Áir, har felagið fremur kynbótaarbeiði og gransking. Felagið hevur eisini eina lívfiskastøð í Skopun, eina marina royndarstøð í Nesvík, eina sílastøð í Skálabotni, og eina alistøð í Hesti. Fiskaaling hevur drúgvar royndir við kynbótaarbeiði av laksi og sílum, og við kalvaaling. Harafturat hevur Fiskaaling nýliga íverksett eina spennandi royndarverkætlan fyri toskaaling.

Til at menna verandi og framtíðar alivinnu og marina biotøkni, er Fiskaaling við at uppbyggja eitt granskingarumhvørvi í alivísind, gen- og biotøkni í samstarvi við granskingarstovnar bæði innan- og uttanlands.

STARVSINNIHALD OG GRANSKINGARØKI
Granskararnir koma at fyrireika og leiða nýggjar granskingarverkætlanir, umframt at kveikja og vegleiða aðrar granskarar á stovninum. Úrslitini frá granskingini verða almannakunngjørd í altjóða vísindaligum tíðarritum, og kunnaði vinnuni.

Vit søkja fólk við áhuga í:
- Aling av nýggjum fiskasløgum, nýggj alitøkni og kunningartøkni
- Gen- og biotøkni

KRAVDIR FØRLEIKAR
- Universitetsútbúgving í náttúruvísindi/verkfrøði, góðar fakligar og persónligar førleikar
- Góðan málkunnleika í enskum, bæði munnliga og skrivliga

YNSKILIGIR FØRLEIKAR
- Granskaraútbúgving (Ph.D.) ella tilsvarandi royndir við gransking og menning
- Altjóða royndir frá t.d. norðurlendskum ella EU granskingarverkætlanum
- Royndir frá undirvísing og vegleiðing av M.Sc./Ph.D.-lesandi
- Vinnulívsroyndir

VIT BJÓÐA
- Góðar menningarmøguleikar ígjøgnum granskingarsamstarv innan- og uttanlands
- Góðar møguleikar fyri at luttaka á altjóða ráðstevnum, skeiðum og fundum
- Møguleika fyri at arbeiða lutvíst heimanífrá
- Kappingarføra løn, sum verður avtalað í mun til útbúgving og royndir

Meira fæst at vita við at venda sær til Hannes Gislason, granskingarleiðari, M.Sc. Ph.D., fartlf.: 214749, teldupost: hannes@fiskaaling.fo ella Ingolf Joensen, stjóri, M.Sc., fartlf.: 214747, teldupost: ingolf@fiskaaling.fo.

UMSÓKN
Umsókn við ævisøgu (C.V.) og avriti av viðkomandi skjølum kann sendast til:

P/F Fiskaaling
Við Áir
Att.: Hannes Gislason
FO-430 Hvalvík

Umsóknarfreistin er 10. apríl, 2006.

TEAM85 © Photographer: mehmet alci | Agency: Dreamstime.com

**Kunningarskriv**

# Viðvíkjandi Farmaleiðum

Strandfaraskip Landsins gevast við at flyta farm landvegis 1. apríl 2006. Tó verður avmarkaður vøruflutningur millum hesi øki:

- Stykkjagóðs og fiskaflutningur ímillum farmahølið í Tórshavn og farmahølið á Tvøroyri.
- Stykkjagóðs millum Klaksvík og bygdirnar á Kalsoy, Svínoy og Fugloy.
- Stykkjagóðs (og lutvíst fiskaflutningur) millum farmahølið í Tórshavn og Hest, bygdirnar á Sandoy og Skúvoy.

**Seinasta freist at handa farm inn á Farmastøðirnar, til tey økir sum Farmaleiðir ikki fara at koyra til framyvir, er 31. mars 2006.**

Fyri farm, sum verður sendur til øki, har Strandfaraskip Landsins ikki avgreiðir farm, men har SL er eitt millumlið, verða fylgjandi mannagongdir galdandi:

- Viðskiftafólkið skal hava gjørt avtalu við annað flutningsfelag, um at koyra farmin víðari, áðrenn tað verður handað inn til Strandfaraskip Landsins.
- Avrokningar um víðari flutning verður beinleiðis millum viðskiftafólkið og flutningsfelagið, viðkomandi hevur gjørt avtalu um víðariflutning við.

Farmaleiðir vilja samstundis nýta høvi, at takka viðskiftafólki okkara fyri gott samstarv øll hesi árini.

**Telefonnummur okkara eru broytt, og eru at síggja á heimasíðu okkara www.ssl.fo**

STRANDFARASKIP LANDSINS

www.ssl.fo

REFROZ

Lesið Sosialin -so eru tit við!



**Á Fíggjardeildini starvast 6 fólk. Fíggjardeildin ráðgevir og vegleiðir leiðsluni í fíggjar-, lønar- og starvsfólkaviðurskiftum. Deildin ger fíggjarætlan og roknskap, og hevur eftirlit við rakstri og lógarbundnum útreiðslum. Deildin skipar somuleiðis fíggjarógararbeiðið saman við Almanna- og heilsumálaráðnum.**

## Almannastovan søkir búskaparfrøðing

Hevur tú hug at royna teg í einum spennandi arbeiðsumhvørvi í støðugari menning? So er eitt fulltíðarstarv sum búskaparfrøðingur á Fíggjardeildini leyst at søkja.

Umsóknarfreistin er 19. apríl. Nærri fæst at vita um starvið á almannastovan.fo ella portal.fo.

almannastovan
www.almannastovan.fo

KREA.FO · TEL 47 80 80



**Vitanardeildin er tænastudeild á Almannastovuni, sum m.a. tekur sær av umsiting og menning av KT-undirstøðukervi og fakskipanum, KT-trygd, KT-nýtslu og kunning. Dentur verður lagdur á, at allar uppgávur verða avgreiddar við atliti til høgt tænastustøði.**

## Almannastovan søkir KT-starvsfólk

Hevur tú hug til at royna teg í einum spennandi arbeiðsumhvørvi í áhaldandi menning? So er eitt avbjóðandi og mennandi starv sum KT- starvsfólk á Vitanardeildini leyst at søkja.

Umsóknarfreistin er 19. apríl 2006.

Nærri fæst at vita um starvið á almannastovan.fo ella portal.fo

almannastovan
www.almannastovan.fo

KREA.FO · TEL 47 80 80